

# Favorittarnir sannførd

**Enn eitt gott umfar í hesum, tí besta Prix Føroyar nakrantíð, var um vikuskfitið. Favorittarnir Terji Rasmussen og Kristleif Zachariasen leiktu seg rættvíst víðari. Fleiri yvirraskilsi vóru tó, har av 70ara rokkurin hjá EGR2PLZ stóð fyri tí góða, meðan onkikanndiskuterast.altkann royndu at sjokera við síni framførslu, men kanska mest gjørdu tað við vánligum tónleiki**

4. UMFAR
*Jan Lamhauge*
*post@sosialurin.fo*

Kvøldið byrjaði væl við Kristleifi Zachariasen. Fram um hinar framfør-arnar hetta kvøldið so hevur Kristleif eitt ríkt tekstunivers, og tónleikurin snýr seg um at finna eina javnvág, har tekstirnir fáa lív, tó uttan at tónleikurin tekur yvir.

Og tað riggaði væl.

Sorgblíðu tekstirnir hjá Kristleif dansaðu ein vakran vals við lekkrum tónum við slidegittara, harmoniku, akkustiskum bassi og jazzutum trummum.

Hóast okkurt lag ikki var eins gott og hini, so átti Kristleif tey løgini, ið festu seg best eftir at kvøldið var av. Her hugsi eg um serliga "Beyond the Sky" við vakra og fangandi niðurlagnum "Little sunshine, my brothers" og lagið "Yesterdays".

## Terji enn í Prix-form

Terji Rasmussen Band var stóri favoritturin hetta umfarinum. Terji er legenda innan føroyska tónleikaheimin, og var saman við Moirae fyrsti Prix-vinnarin.

Tað eru nú nøkur ár síðan, Terji veruliga var á toppinum, men áhoyrarnir hava tó ikki gloymt hann, og hevði hann flestar fjepparar í Mentanarhúsinum hetta kvøldið.

Terji hevur altíð verið ein av Føroya bestu framførarum, og tað var stuttligt at síggja hann aftur á pallinum. Stílurin minti um Moirae-dagarnar, men saman við framúrskarandi rútmunum hjá Rógva á Rógvu og Arnhold Ludvig bleiv tað meir funky.

Tað var ikki nakað nýtt "Eros" ella "Eg flýggji til tónleikin" millum løgini, og røddin hjá Terja hevur ljóða betur. Hóast tað so var hetta nakað tað besta, vit hava hoyrt frá Terja í fleiri ár.

Tað var ikki nakað beinleiðis nýtt, men hinvegin so var tað so hamrandi væl leikt og framførslan hjá Terja var so mikið góð, at fá mundu ivast í, um Terji ikki fór at koma víðari.

## Sparkaðu nýtt lív í gamla rokkin

Næsti bólkurin EGR2PLZ er ein rættiliga nýggjur bólkur. Nøgvir av leikarun-